## DAGSINS MEINING

# Smáar sparingar aftur á fíggjarlógina

Orðaskiftið um fíggjarlógaruppskotið 2005 var tamt, um vit hugsa um sjálvt innihaldið í lógaruppskotinum. Her var lítil og eingin dramatikkur og lítil ósemja. Hinvegin var eitt sindur av tjaki millum ávísar samgongutingmenn og landsstýrismenn teirra. Tað er eitt sindur torført at skilja, hvat hesir smáu samanbrestir veruliga snúgva seg um, tí oftast var talan um heilt smá mál ella ávísar merkissakir, ið áttu at havt verið greidd á einum samgongufundi. Tað er bæði óprofessionelt og ófólkaligt at plága løgting og almenning við slíkum. Sjálvandi skulu vit hava eitt demokratiskt orðaskifti, og sjálvandi skulu tingmenn nýta henda rætt og ikki í einum og øllum rætta seg eftir floksdisiplinini ella samgongudisiplinini. Tó skuldi ein hildið, at nógvir ivaspurningar áttu at verið viðgjørdir innanhýsis áðrenn.

Eitt er at tingmenn vilja sleppa at markera seg - annað er nýta orðaskifti, sum øll lurta eftir til at skapa smáar samanbrestir uttan nakað eygsýniligt hald í veruleikanum. Hetta er so ikki heilt vandaleyst, um ein ynskir, at samgongan skal halda í fýra ár. Samgongan skuldi helst hildið í fýra ár, tí fleiri val innan eitt stytri tíðarskeið eru til stóran ampa fyri politisku tilgongdina. Vit hava skjótt bý- og bygdaráðsval og til várs verður ivaleyst fólkatingsval. Tað er nóg mikið, og tí eiga samgongutingmenn ikki at spæla við eldin soleiðis, at vit fáa eitt løgtingsval í ótíð.

Sparingarnar á fíggjarlógaruppskotinum elvdu ikki til teir stóru samanbrestirnar. Her hevur forarbeiðið ivaleyst verið í lagi. Hinvegin kom tað fram, at Fíggjarmálaráðíð hevur framt eina røð av smáum sparingum, sum raka lutfalsliga sera hart. Hetta kemur av, at landsstýrið hevur nýtt plenuklipparin til ein stóran part av fíggjarlógarupp-skotinum. Tá so er, verður rakað sera tilvildarliga og á ein hátt, sum kann verða sera óheppin fyri tann stovn ella tað felag, sum kemur fyri sláimaskinuna. Vit hugsa sjálvsagt um áhugafelgini hjá ymsum veikum samfelagsbólkum. Tað er smáligt at skera allar hesar smáu konturnar við 10%. Hesar skerjingar merkja einki fyri landskassan. Tær eru helst har eina og aleina av principiellum orsøkum: øll skulu kenna sviðan! Hinvegin merkja hesar smáu skerjingar nógv fyri tað einstaka áhugafelagið. Her hevur fíggjarnevndin ein góðan møguleika at markera, at hon hevur meira sosialt tilvit og størri ábyrgdarkenslu enn politikarin og embætismenninir í Fíggjarmálaráðnum.

Kaj Leo Johannessen hevur boðað frá, at eingi størri frávik verða told í fíggjarnevndarviðgerðini. Hetta er skilagott sæð frá einum heildarsjónarmiði. Hevur tú eina samgongu, so ber ikki til at alt ov stórt glopp er millum fíggjarnevnd og landsstýri. Hinvegin eiga allir tingmenn at síggja til, at smáligheitirnar á fíggjarlógaruppskotinum verða beindar burtur undir viðgerðini. Tað hevði tænt øllum til æru. Og soleiðis at teir veiku bólkarnir í samfelagnum ikki verða raktir. Eisini tá hugsað verður um, hvussu stórt frívillugt arbeiði verður gjørt har, tí eiga politikararnir at venda hesum aftur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tilboð til brekað: heim og kúr!

**Vegna Ítróttarsambandið fyri Brekað**
*Johan Samuelsen*
*Skrivari*



Undirvísingartilboðini til tey brekaðu á Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla verða skerd til komandi skúlaár um mynduleikarnir ikki broyta støðu og játta meiri pening til serstaka frítíðarundirvísing, sum er studningsheimmilað ella afturgoldin kommununum 100% frá landinum, (væl at merkja um nóg mikið av peningi verður játtaður!), meðan almenna frítíðarundirvísingin fær 50% afturgoldið úr landskassanum. Hetta er ein veruleiki sum endurspeglast aftur í framlagda fíggjarlógaruppskoti landsstýrsins fyri 2005. Og hóast vit í ÍSB vita, at ikki stendur so væl til fíggjarliga í landi okkara, so er henda avgerðin um at skerja undirvísingartilboðini til tey brekaðu fallin okkum fyri bróstið! Og skeivleikarnir av hesi gerð eru eyðsýndir, og raka okkara rørslu- og menningartarnaðu medborgarar so ómenniskjaliga hart.

**Kvøldskúlaskipanin – ein góð skipan**
Ein lítil frágreiðing, hví so er: Vit hava havt eina skipan undir kvøldskúlaskipani síðani ÍSB byrjaði virksemi sítt fyri skjótt 25 árum síðani – og var tað tann dámligi og positivi kvøldskúlastjórin Napoleon Nólsoy, sum alt fyri eitt tók undir við okkum at skipa so fyri, at henda undirvísingin fyri brekað skuldi skipast í kvøldskúlaregi, eftir at so at siga øll okkara ítróttarfeløg høvdu víst eini áheitan frá ÍSB aftur, um at fara undir handikappítrótt, við teirr grundgeving, at tey kendu onki til slíka ítrótt. Karmarnir fyri eini vælskipaðari og gevandi undirvísing fyri okkara veikastu borgarar gjørdist teir bestu, og hesin minnilutabólkur í landi okkara tók ímóti tilboðunum við opnum ørmum – tað bleiv eins sjálvsagt fyri tey at fara á kvøldskúla og møta líkasinnaðum ungdómum, sum fyri øll hini "normalu" – byrjað var í smáum, men av tí at flestu rørslu- og menningartarnaðu medborgarar okkara búgva á høvuðsstaðarleiðini, so fjølgaðist liðið av fólki við breki um ítróttartilboðini, sum Kvøldskúlin hevði at bjóða fram, heilt skjótt, til nú at vera eini 250 í tali, sum luttaka í svimjing, borðtennis, boccia o.s.fr. um landið alt - og undir hesi somu kvøldskúlaskipan. Og ikki bara luttaka, tey beinleiðis gleða seg til hvørja ta einastu ferð at møta upp, tá høvi býðst.

**Ítróttur gevur tí brekaða sjálvsálitið aftur**
Og hví gera tey so tað? Jú, av teirri einføldu orsøk, at hetta eru einastu tilboð, sum standa teimum í boði, tá um frítíðartilboð ræður. Og meðan alt, sum eitur fysioterapi er meiri ella minni keðiligt, so er ítróttarundirvísingin bæði stuttlig og stimbrandi. Tí umframt tað, sum verður vunnið reint kropsligt og fysiskt ígjøgnum ítróttina - so kemur nakað sálarligt og sosialt inn í myndina, sum er torført at uppnáa á sama "lætta" máta við vanligari fysioterapi. T.v.s. at tað hendir ein broyting av sinnisstøðuni og harvið uppfatanini av sjálvum sær. Hin brekaði fær sjálvsálitið aftur og kennir sjálvrespekt við at gera ting, sum hann ella hon hildu vera púra ómøgulig. Hetta vil ávirka eina broyting í uppfatanini av einum sjálvum - nú eisini í lutfall til umhvørvið. Motivatiónin er skapt og hevur hon eina positiva ávirkan á samlaðu støðuna, og hon er í sjálvum sær gull verd hjá tí brekaða, ikki minst í ofta strævna gerandisdegnum, og er tað sjálvsagt ein fongur bæði hjá tí einstaka og eisini hjá samfelagnum, tá soleiðis gongur – hetta er ein stórur partur av hugsjónini aftan fyri handikappítróttina um allan heim.

Eisini kann sigast, at nógv lond, sum vit plaga at sammeta okkum við, missunna okkum hesa kvøldskúlaskipan, og saman við øllum tí sjálvbodna arbeiðinum innan ÍSB, er hetta ein heildarskipan, sum vit kunnu vera stolt av.

**Hugstoytt**
Umframt gleðina hjá hvørjum rørslu- og menningartarnaðum menniskja her á landi at hava ein møguleika at íðka ítrótt saman bæði í gleði og gamni, so hava Føroyar sum tjóð eisini vunnið sínar stórstu sigrar í altjóða høpi júst innan brekaítróttina, og tað er hesi skipan og góðu umstøðunum har partvíst at takka fyri – har var grundin løgd, evnini funnin og so varð farið víðari at byggja omaná, og úrslitini kenna vit øll! Skal nú alt hetta arbeiðið detta fyri bakka, bara tí vit hava eina óliðiliga skipan og raðfestingin er ikki í lagi – at leggja á har garðurin er lægstur, hevur ongantíð verið umhildið í Føroyum, og eg gangi út frá sum givið, at ongin politikari hevur sum endamál at gera umstøðurnar verri hjá okkara brekaðu medborgarum. Vælsignaðir tinglimir, við fíggjarnevndarformanninum á odda, takið tykkum saman, latið játtanina verða á einum støði, so rúm verður fyri teimum brekaðu eisini í framtíðini – tað skulu tungtvigandi argumentir til hjá fíggjarnevndini at broyta nakað sum helst, verður sagt, men eg loyvi mær at siga, at hesin bólkurin, sum ongan góðan talsmann hevur við sterkum pressiónsbólki aftan fyri seg, verður ikki bara við sviðið soð um játtanirnar ikki koma at røkka úr landskassanum , hesi hava snøgt sagt ONKI annað frítíðartilboð at fara til, sum vanligi borgarin í hesum landi hevur, og hjá mongum teirra er heldur onki, sum eitur møguleiki fyri arbeiði, umframt at tey búgva heima hjá mangan troyttum foreldrunum ella á stovni – hetta er tað sama sum at siga: farið heim og setið tykkum og kúrið úti undir vaðingini med alla – tí brekatilboðini í ítrótti o.ø. eru tað einasta, sum tey hava at síggja fram til – enn!?

Eg vóni ikki, at hetta verður úrslitið, tá fíggjarlógin er endaliga avgreidd.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Hygg aftur um teg, men lít frameftir

**Jan Christiansen**
*borgarstjóri*


VAL04

Býráðsvalið nærkast, og nógvir flokkar og enn fleiri valevni royna at gera vart við seg.

Tað verður lova mangt og hvat, og soleiðis eigur tað óiva at verða undan einum vali. Trupulleikin er bara, at valevnini og flokkarnir klára ikki altíð at liva upp til tey gyltu vallyfi, ið verða givin.

Fólkaflokkurin setur eina æru í, at tey lyfti, sum vit koma við, ikki bara eru tóm orð, men at tey verða veruleiki, um vit koma at mynda einum komandi býráði.

Fólkaflokkurin hevur sitið í samgongu við góðum fólki seinastu fýra árini, og hava vit roynt eftir øllum alvi at umsita bý okkara eftir besta førimuni. Við góðum og tøttum samarbeiði, haldi eg, at tað hevur hepnast okkum rættuliga væl.

Vit hava megnað at gera kommununa skuldafría, so at peningur, ið fyrr fór til rentur og avdrøg, nú kann síggjast aftur í gerðum í býnum. Tað hevur verið tungt, men nú kunnu vit verðuliga síggja úrslitið af førda fíggjarpolitikkinum.

Og neyðugt er við góðum gjaldføri, um kommunan skal kunna gera nakað munagott komandi árini. Fólk verða søgd úr starvi, bæði hjá teimum privatu og hjá tí almenna, og tí er enn meira umráðandi, at kommuna er før fyri at seta arbeiði í gongd í komandi tíðum.

**Eingin uppsøgn og nógv arbeiði**
Við tí varisliga og tilvitaðað førda fíggjarpolitikki, kommunan hevur ført, er gleðiligt longu nú at kunna siga, at eingin nýtis at ræðast uppsagnir frá kommununi, og at yvir 115 mill. kr. eru avsettar komandi ár til íløgur og arbeiðsskapandi tiltøk.

Tað er tá tíðirnar ikki eru góðar á privata marknaðinum, at tað almenna skal seta arbeiðsskapandi íløgur í gongd. Vit hava, ið góðari tíð, ásanna, at trøðini ikki vaksa inn í himalin, og kann kommunan tí nú gera arbeiðsfremjandi íløgur, - uttan lántøku, sjálvandi - soleiðis at arbeiði vónandi verður til allar hendur í kommununi.

Samgongan, við fólkaflokkinum á odda, hevur virka fyri eini betri kommunu, og vit hava loyst tey mál, sum vit settu okkum. Bert ein góður fíggjarpolitikkur tryggjar framhaldandi einari virknari og góðari kommunu. Vit bjóða okkum fram aftur, og gevur tú okkum álit enn einaferð, so kunnu vit lova, at tann virkni politikkur, ið hevur verið førdur, vil halda fram.

Bert við hyggja eftir, hvat ið gjørt er seinastu fýra árini, kanst tú meta um, um fólkaflokkurin aftur er førur fyri at standa á odda komandi valskeið.

# Betri møguleikar fyri vinnuna

**Vit eiga at gera tað betri hjá fremmandum skipum at koma at bryggju í Havn.**

**Steinfinn Mittelstein**
*Valevni sambandsfloksins í Havn*


VAL04

Almennu havnagjøldini eru ein forðing fyri at fleiri útlendsk skipa koma at bryggju í Havn, har tey kunna fáa tænastur og veitingar av ymsum slag. Við lægri havnagjøldum gerast inntøku møguleikarnir tilsamans størri, tí við lægri gjøldum, gerst tað hugaligari hjá skipum at koma at bryggju, og harvið verða tey fleiri, og skapað hesi skipini størri samlaðar inntøkur til Tórshavnar Havn, og ikki at gloyma allar fyritøkurnar í kommununi. Her er hópur av alskyns vinnum, ið høvdu verðið fegnar um øktar inntøkumøguleikar.

Vit síggja øll skipini, ið liggja í Nólsoyarfirði, ári runt, og hevði tað uttan iva hjálpt til, um havnagjøldini vóru lægri. Tað hevði ført við sær, at fremmand skip og reiðarí høvdu haft lættari við at tikið avgerð um at fari til bryggju, og harvið skaptu vit betri møguleikar til vinnuna í kommununi. Mong eru skipini, og skal ongin ivast í, at hettar hevði komi okkara hondverkara- og tænastuvinnu til góðar.

Nú vøksturin í búskapinum er steðgaður, eru umráðandi at kommunan skapar góðar karmar til vinnuna. Her er talan um øktar møguleikar til vinnuna, her er møguleikar at fáa fremmandan valuta til landi, umframt at samhandilin millum Føroyar og onnur lond verður mentur, til gagns fyri allar føroyingar.

Talan er um hópin av tænastum, ið okkara vinna kann bjóða útlendskum skipum; størri og smærri umvælingar, trol- nóta- og annar fiskireiðskapur, oljuveitingar, proviantur og kanska umskipan av veiðu, sum kundi skapt størri virksemi hjá flutningsfyritøkunum.

Hetta vil eg arbeiða fyri.

# Var tað so neyðugt at sløkkja fyri CNN?

**Búi Tyril**



Nú Televarpið hevur sløkt (tendraðu aftur undir vikuskiftinum av onkrari orsøk, smb. leiðsluna tó bert fram til 25. november) fyri heimsleiðandi live tíðindarásini CNN fyri at føroyingar skulu fáa enn fleiri danskar sjónvarpsrásir at velja í, veit eg at vit eru fleiri ið eru vónsvikin. Júst CNN var ein høvuðsorsøk til at vit yvirhøvur fingu okkum Televarpið; vit høvdu aldri keypt tann pakkan við tí samansetingini fyri tann prísin um ikki tað var fyri júst tað virði sum CNN tilførdi -- men whoops, nú skulu vit hava eina aðra samanseting sum vit ongantíð hava biðið um!

Eg mótmælti á røttum stað tá hetta hendi fyri einari góðari viku síðani, men einki bendir á at tað hjálpti. Nakrar dagar seinni standa miðlarnir á tá fyri at fortelja okkum hvussu fantastiskt tað er at vit nú fáa enn meira DR, ja og so eina príshækking. Ikki eitt orð um CNN, hóast kundarnir hjá Televarpinum keyptu sínar pakkar millum annað við tí grundarlag at CNN var við; sum um at CNN bara var luft! Og hetta hóast ein heit debatt júst nú leikar sum vísir at nógvir føroyingar kenna seg snýttar av at hava brúkt nógv ár av sínum lívi til at læra eitt mál sum ikki gevur atgongd til meira enn ein lítlan dunnuhyl. Hvørjum líkist hetta?

Eg skilti á stjóranum í Televarpinum tá eg eg tosaði við hana at hendan handling skal forsvarast við tí at tað ber ikki til at gera øllum til vildar, at kanningar eru gjørdar yvir hvat hyggjararnir vilja hava, at BBC skal kunna brúkast ístaðin fyri CNN, og so giti eg tað kanska liggur í luftini at Televarpið er kommercielt skipað og hevur ikki eina public service uppgávu.

Jú, tað kann vera torført at gera øllum til vildar; men harfrá og til tað hetta smakkloysi er langt. Televarpið skuldi hóast alt havt eitt image at forsvara, eitt image sum eisini smittar yvir á eigaran Føroya Tele, sum harafturat framvegis er ogn skattaborgarans. Hvat viðvíkur »kanningum« yvir hvat flestu síggjarar ynskja, so loyvi eg mær at seta spurning við virði á einari slíkari so leingi einki ítøkiligt er víst fram; eg havi so ikki sæð nakra kanning og vit vórðu so ikki spurd um nakað sum helst.

Ein heilt annar spurningur eg og fleiri onnur kundu hugsað okkum at sett ljóðar: Er Televarpið líkasælt við dygdina og breiddina í sínum útboði?

Uttan mun til hvat fólk halda um DR1 og DR2, hví offra júst CNN í samanhanginum? Hví ikki offra okkurt annað ístaðin? Er tað so umráðandi at senda so nógv niðurgerandi sjónvarp sum lítið annað tykist hava til funktión enn at mannminka fólk og sáa ómegd fyri løtuvinning? Danir sjálvir vilja ikki ganga við til at verða isoleraðir frá kanalum sum CNN; teir eru ikki líka fixeraðir við danskt TV sum vit føroyingar partú skulu vera. Vit skulu altso zappa ímillum einar 5-10 danskar kanalum og steingjast úti frá globalum live tíðindum!

Eg dugi heldur ikki at síggja hvussu BBC kann samanberast við CNN, til dømist tá stórar hendingar fara fram; talan er um tvey ymisk format. CNN er eisini nakað heilt fyri seg tá tað kemur til breiddina og tyngdina í kompetentum fólkum sum úttala seg. Tak til dømis temavikuna herfyri um outsourcing í India, ella "Inside the New China" ella ta stóru dekkingina av forsetavalinum í USA, og fastar sendingar úr Asia og Miðeysti.

Men nei. Nú skulu vit ístaðin fyri heimselitu taka til takkar við heimføði -- til at filtrera okkara mynd av veruleikanum enn meira enn hon longu verður filtrerað gjøgnum tær umskrivingar vit so leingi hava verið innløgd til í føroyskum uttanríkis tíðindum.

Vit sum búgva so fjarskotið her mitt í Atlantinum, okkum skal altso ikki unnast tíðindatilfar frá CNN!

Eitt er góður handilssiður, eitt annað er tann størri samanhangurin. Ein stovnur sum Televarpið kann aldri koma undan sínari ábyrgd yvir fyri samfelag og mentan íroknað fólki og, ikki minst, ungdómi.

Hvat siga skilafólk innan Føroya Tele til hetta hundalívið í dótturfelagnum?

# Skúlar pluss mál pluss grannar pluss pengar

Nordplus er evnið á fyrsta almenna fundinum hjá Norrøna Felagnum í Føroyum í vetur.

Á fundinum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 7. oktober kl. 19.30 fer Henrik Neiiendam Andersen frá Cirius-Danmark at greiða frá um Nordplus skipanirnar. Hann fer at eisini at geva teimum, sum vilja tað, vegleiðing í at søkja um pengar frá Nordplus.

Norðurlendska ráðharraráðið bjóðar fimm møguleikar at søkja um studning frá Nordplus í ár, næsta ár og í 2006.

Nordplus er ætlað skúlafólki, tað vil siga næmingum og lærarum, og teimum, sum eru góð við norðurlendsku málini.

Endamálið við stuðlinum er at styrkja norðurlendska felagsskapin og samleikan við støði í søguligu, mentanarligu og demokratisku felagseyðkennunum hjá Norðurlondunum. Kjarnin er flytføri og netverk.

Í Nordplus eru fimm stuðulsskipanir:

**Nordplus Junior** er ætlað lærarum og næmingum í fólkaskúlum, miðnámsskúlum og í yrkisútbúgvingum. Næsta umsóknarfreist er 15. oktober 2004.

**Nordplus** skal menna samstarvið millum lærarar og studentar í hægri útbúgvingum. Næsta umsóknarfreist er 1. februar 2005.

**Nordplus Vaksin** er ætlað at menna samstarvið um fólksliga upplýsing og undirvísing fyri vaksin. Næsta umsóknarfreist er 1. mars 2005.

**Nordplus Granni** er serliga ætlað at menna samstarvið við grannarnar eystanfyri, fyrst og fremst við Baltalondini, men eisini við útnorður-Russland. Samstarvið er fyri allar útbúgvingarskipanir. Næsta umsóknarfreist er 1. februar 2005.

**Nordplus Mál** skal menna støðuna hjá norðurlendsku málunum í Norðurlondunum og styrkja málini í altjóða høpi. Næsta umsóknarfreist er 15. oktober 2004.

Í Føroyum kunnar og vegleiðir Altjóða Skrivstovan www.ask.fo um allar fimm Nordplus skipanir.

Í Danmark stendur Cirius www.ciriusonline.dk fyri kunningini og vegleiðingini. Henrik Neiiendam Andersen, sum verður á almenna fundinum hjá Norrøna Felagnum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið, arbeiðir hjá Cirius í Danmark.

# Rætting

Konsertin við Húsakórinum í Vagskirkju verður tórskvøldið klokkan 20, ikki onskvøld, sum áður sagt frá.

**-blðm -**